# Gomul í veitsluhýri í Saltangará



*Hóast árini eru komin, sæst, at sinnið er ungt. Arne Solmunde og Poula Andersen avmyndaði í køkinum í nýggju felagshúsunum hjá Eldrafelagnum Nón í Saltangará. Aftast á myndini, Klæmint Túgvusteina*

**Stórthundrað fólk vóru til hugnaløtuna í nýggju húsunum hjá Eldrafelagnum Nón í Saltangará, tá felagið hevði sín fyrsta fund har. - Vit eru ógvuliga glað um, at so nógv fólk nýttu høvið at koma inn á gólvið hetta kvøldið, sigur Amy Djurhuus, forkvinna í felagnum**

VEITSLUKVØLD
*Orð og myndir:*
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Nýggja húsið hjá eldrafelagnum Nón var fullsett, tá fyrsti fundur varð hildin har týskvøldið í seinasu viku.

Eftirsum hetta var fyrsta fundarkvøld í nýggju felagshúsunum, vóru býráðslimirnir og nevndin í arbeiðarafelagnum, Hæddini, boðin við.

Tað komu so nógv fólk inn á gólvið hetta kvøldið, at enntá úti í ganginum varð borð sett upp. Men øll sluppu til borðs, nóg mikið var av mati og sera væl smakkaði.

Eldrafelagið Nón, sum serliga hevur limir av Skálafjørðinum, keypti felagshús fyrr í ár.

Húsini í Torvgøtu eru eini 30 ára gomul, men tey eru í góðum standi, og nossligt er uttan um.

Síðani felagið keypti húsini hevur dúgliga verið arbeitt, soleiðis at húsini nú eru betur egnað til felagshús.

Eldrafelagið Nón hevur stívliga 16 ár á baki, og hevur øll árini havt innivist til tey ymisku tiltøkini í hølunum hjá arbeiðarafelagnum Hæddini.

Men nú hevur felagið so fingið egin hús, og frøin var stór, nú húsið varð klárt at taka í nýtslu.

– Ætlanin er, at fólk skulu kunna koma í húsini og gera eitt hvørt handaligt arbeiði hvønn dag - ella bara støkka inn á gólvið til prát og hugna. Nú kunnu vit hava alt tað, vit fáast við, standandi til næstu ferð, men slíkt ber ikki til, tá ið tú ert í hølum hjá øðrum, sum eisini verða brúkt til onnur endamál, sigur Amy.

Amy sigur, at tey eisini ætla at nýta húsini til annað enn felagsarbeiði.

– Eitt nú ber til at leiga hølini til føðingardagar ella aðrar veitslur. Eisini eru húsini serstakliga væl egnað til skeið- og fundarvirksemi ella til gisting, um tað skal verða, sigur Amy.

Felagið hevur um 150 limir, og nýggir limir kunnu tekna seg hjá Amy ella onkrum av hinum í nevndini. Aldursmarkið er 50 ár.



*Sæunn og Jóannes S. Hansen - hon vegna býráðið og hann setti dám á kvøldið við frálíka harmonikuspælinum*



*Aldursmarkið at gerast limur í eldrafelagnum er 50 ár, og tað kravið lúkar Kári P. Højgaard, løgtingsmaður, sum nýtti høvið at halda røðu. Sum tann skemtari hann er, fekk hann láturin at runga. Tá hann skuldi bera fram heilsu fyri Meinhard Bjartalíð, prest - sum var noyddur at fara - kom hann av misgávum at siga: „Nú er prestur farin" - og tá fingu fólk ikki afturhald, sum tey flentu*



*Nólsoyingurin Otto Frist Hansen er millum teir umleið 150 limirnar hjá eldrafelagnum*



*Jenny Højgaard til vinstru og Olivia Hansen. Jenny er mamma Kára P. Højgaard*



*Nevndin í eldrafelagnum Nón; frá vinstru: Poula Andersen, Johanna Reyná, Hanna Nielsen, Lenni Højgaard, Ansa Højgaard, Amy Djurhuus, Malvinus Reyná, Maria Olsen og Ingun Olsen*



*Jona Danielsen hevði prýtt vakurt pyntaðu borðini*



*Fólk streymaðu til, og okkurt um 120 fólk vóru við til fyrsta fundin í nýggju húsunum. Frá vinstru: Maria í Grund, Maria Jacobsen, Elsebeth Carney, Katrina Jensen og Dávur Jacobsen*



*Frá vinstru: Bjarni Hansen, Petur Knudsen og Johannes Køtlum*



*Oda og Ingolf Samuelsen hava meginpartin av lívinum búð í Vági í Klaksvík. Men hetta kvøldið vóru tey komin úr Streymnesi, har tey eisini eiga hús, at hugna sær saman við vinum og felagum sínum*



*Amy Djurhuus forkvinna í eldrafelagnum Nón og Símin Pauli Poulsen, skrivari í landsfelagnum hjá pensjónistinum. Amy var serstakliga fegin um, at kvøldið eyndaðist so væl, og at so nógv nýttu høvið at koma. Hon helt fleiri røður og takkaði hjartaliga fyri ta stóru vælvild felagnum er sýnt bæði frá býráði, vinnulívinum og einstaklingum*

# Gud tosar við okkum gjøgnum Vassulu

PROFETUR
*Jan Müller*

Í meira enn 20 ár hevur Gud talað til heimin gjøgnum egyptisku kvinnuna Vassulu Rydén. Og hesi árini hevur hon ferðast verðina runt og hildið meira enn 800 fyrilestrar. Nú er hon so komin til Føroya á eini rundferð í Norðurlondum. Hon skuldi tala í Vesturkirkjuni í gjárkvøldið, og ein av teimum, sum fór at sita á kirkjubonkinum var Hans Jákup Joensen, bispur, sum hevði vitjan av Vassulu profeti á bispagarðinum í gjár. Sosialurin fekk orð á hana í bispagarðinum. Tann sera fryntliga Vassulu segði seg vera komin til Føroya fyri at bera boðskapin víðari frá Gudi, sum tosar gjøgnum hana.

– Eg fari at greiða frá hvussu mítt lív varð, áðrenn Gud tosaði við meg fyrstu ferð, og hvussu mítt lív hevur verið eftir hetta. Eg fari at siga frá øllum tí, sum er komið frá Gudi hesi 20 árini. Vassulu sigur, at hennara uppgáva er ikki at sannføra nakran. – Mín uppgáva er at vera boðberi.

Uppá fyrispurning hví fólk skulu trúgva, at hon er ein profetur, nú tá so mong onnur fólk eisini siga seg tosa við Gud, sigur Vassulu, at hetta er nakað, sum fólk mugu meta um sjálvi við at kanna hennara fortíð og lív og tað, sum hon hevur borið víðari fram frá Gudi. Tá kunnu fólk so døma ella meta um seg.

Hvat er tá høvuðsboðskapurin? – Tað er at liva í friði við Gud og skapa frið millum manna. Tað er ein sannroynd, at kirkjunar standa ikki saman í dag. Gud vil, at tær at semjast og virka saman. Gud veit, at dialogur er millum leiðararnar innan tær ymsu kirkjurnar, og hann heitir á tær um at finna og standa saman. Hetta er ein av høvuðsboðskapunum, men Gud vil eisini hava meg at siga fólki, hvat tað vil siga at liva eitt lív saman við Gudi. Hann vil eisini í samband við øll vanlig fólk, sum eg sjálv eri, og vil hava okkum at skilja seg. Vassulu sigur, at Jesus er Gud. Hon sigur, at tað hava verið nógvir falskir profetar. Ein má skilja millum hesar og veruligar profetar.

– Vit hava Bíbliuna. Hon er liðug skrivað. Men Gud fer ongantíð at gevast at tosa við okkum. So hann heldur fram at tosa við fólk og velur út tey, sum hann heldur skulu bera boðskapin víðari. Vassulu sigur víðari, at hennara uppgáva er ikki at finnast at, døma ella krevja nakað av nøkrum. Gud er á lívi, og hann er okkara dómari. Seinasta dagin verða vit øll dømd av honum, so vit hava ongan rætt til at døma hvørannan.

Vassulu sigur, at hon metir seg sum eitt vanligt menniskja, sum hevur bæði bein á jørðini, men sum hevur móttikið eina gávu frá Gudi, og tað er hana, sum hon ber fram til onnur.



Hans Jákup Joensen, bispur er rættiliga fegin um at hava fingið vitjan av hesi dámliga og spennandi kvinnuliga profetinum, sum hann heldur vera eitt vanligt og lítiðlátið menniskjað. Hann sigur, at hon er sera áhugaverd at hoyra. – Men hvat sigur tú til eina slíka kvinnu, sum sigur, at Gud tosar gjøgnum hana. Onkur vil kanska siga, at tað er blasfemi, tá slíkt kemur fram: - Tað segði man væl eisini um Jesus. Men við Vassulu er tað soleiðis, at hetta er nakað, sum hon fær og ikki biðjur um. Hann fær nakað, sum hon fær boð um at bera fram og so kunnu fólk velja at lurta ella trúgva tí, um tey vilja. Eg fari at lurta og í spenningi. Hetta er eitt sindur óvanligt fyri okkum. Tað er ikki heilt ókent tað Jesus segði við lærusveinarnar, at "eg havi so nógv annað at siga tykkum, men tað tola tit ikki nú. Men tá Heilagi Andin kemur, so skal hann sannføra osfr. Tað, sum Vassulu sigur, nýtist tí ikki at vera í stríð við tað sum er, tað kann vera í samsvar við tað".